# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Johanna Mortensen, fødd Guttesen, vanliga nevnd Ingibjørg, ættað úr Bø, búsitandi í Hvidovre,** andaðist leygardagin 92 ára gomul. Jarðarferðin verður fríggjadagin 5. marts kl. 12 úr Avedøre Kirke til føroyska kirkjugarðin á Vestre Kirkegård. Tey, íð vilja minnast Ingibjørg við blómum ella kransi, kunnu í staðin lata Bíggjar kirkju eina peningagávu, konta í føroysku peningastovnunum.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá ið okkara kæra mamma, vermamma, omma og langomma

**Jenny Hentze**
Sandur
ættað uppi á Regni, Toftum

so brádliga andaðist og varð jarðað.

Tøkk til Poul Færø fyri troystarrík orð í kapellinum. Tøkk til Jákup Reinert Hansen. Tøkk til organist, kirkjutænarar, sangarar og gravarar. Tøkk til heimahjálparnar. Tøkk til tykkum, sum bakaðu og sum hjálptu so væl til við ervinum. Tøkk fyri gávur til Heilafelagið. Tøkk til tykkum øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Richard, Lis og Guðrun**

## Merkisdagar



**60 ára føðingardagur**
Týsdagin 9. marts verða tvíburarnir Birita og Durita 60 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 6. marts í B36 húsinum. Vælkomst verður frá kl. 12.

**60 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 5. mars verður Anna Sjúrðardóttir, Hvalvík, 60 ár. Dagurin verður hildin á Hvalvíksvegi 64 frá kl. 18.

**75 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 5. mars verður Erling Joensen við Gjógv 75 ár. Hann er burturstaddur føðingardagin.

**80 ára føðingardagur**
Leygardagin 6. mars verður Paula Maria Olsen, Tórshavn, ættað av Eiði, 80 ár. Tey, sum hava hug at heilsa upp á Paulu, eru hjartaliga vækomin inn á gólvið úti á Suðuroyavegi 5 frá kl. 17.

## Dagurin

**4. mars. Adrianus**, deyður umleið ár 300. Keisarligur rómverskur embætismaður sum gjørdist kristin og tí varð tikin av døgum. Navnið merkir maður úr Adria í Norðuritaliu. Navn á fleiri keisarum. Magnus Heinason føddur hendan dagin í 1545.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

## Kathrina 8. mai 1978 – 21. februar 2010



*Skjótt er Harranum um...*

*Sárur missur,*
*vit skilja onki.*

*Tað tykist so stutt síðani,*
*tú spældi í túninum,*
*væl nøgd.*

*Arbeiðssom og røsk,*
*álitandi og hjálpsom,*
*hugsaði um hini,*
*spurdi eftir øllum,*
*altíð eitt fitt orð á vegnum.*

*Nú fjala svørt skýggj sólina.*

*Ein rósa í fagrasta blóma skrykt burtur,*
*men eftir stendur lítil, vakur rósuknubbi,*
*og líta vit at honum,*
*tá vita vit,*
*at sólin má fara aftur at skína.*

Hvíl í friði, góða Kathrina.
**e.**

# Vitjan umborð á Nýggja Tróndi í Gøtu

**Var ein túr norðuri í Skagen seinasta leygardag, har eg vitjaði umborð á Nýggjasta skipinum í Føroyska flotanum, Tróndur í Gøtu. Hann liggur í dokkini og tað var sera tvassut og kalt at koma til skipið, men so mikið hugaligari var tað at koma innanborða, heitt og nossligt og stórur blíðskapur**

*Poul Jóhan Djurhuus*
*gjaranes@olivant.fo*




Nýggi Tróndur letur bíða eftir sær. Fólk væntaðu, at skipið fór at koma seinasta leygardag, men tað varð ikki. Manningin vónar at kunna vísa teirra stoltleika fram í komandi viku. Skrokkurin bygdur í Polen, gjørdur endaliga liðugur hjá Karstensens Skibsværft A/S í Skagen.

Hann er sera stórur á at líta, nú hann stendur í dokkini, eftir eitt óhapp undir royndartúrinum. Undirritaði vitjaði umborð leygardagin. Tá ein av yvirmonnunum varð ynsktur til lukku við nýggja skipinum, tók hann skemtiliga til orða: "Nýtt skip við ongari skrúvu!?"

Næstseinasta mikudag var Tróndur í Gøtu royndartúr, har teir m.a. royndu trolútgerðina, sum royndist væl, hóast onkur smávegis justering skal gerast. Á veg innaftur í havnina í Skagen kemur skipið ov nær einum steini, sum rívur seg leysan og endar inni í skrúvudýsuni og ger skaða á nøkur av skrúvubløðunum. Tí mátti hann aftur í dokkina at liggja.

### Stórur og snøggur

Hann er sanniliga stórur og snøggur á at líta bæði innan og uttan. Undirritaði varð vístur runt umborð á skipinum. Gallan er rúmlig og útgjørd sum ein nýmótans køkur á landi. Beint inn frá galluni liggur hugnaliga messan, sum er stór og ljós, og verður eitt hugnaligt hvíldarstað hjá troyttum og svongum monnum. Manningin kemur at verða millum 12 og 14 menn. Hetta kvøldið, undirritaði vitjaði umborð, hevði kokkurin stokt oksakjøt, sum bæði smakkaði og gagnaðist sera væl. Tað er Bjarni Sørensen, ættaður úr Húsavik, sum er kokkur umborð. Hann hevur verið við reiðarínum í nøkur ár.

Tá føroyskir skipsmenn dáma væl at lesa, hevði eg nakað av kristnum lesnaði við, sum eg handaði skiparanum, samstundis sum høvið var at ynskja til lukku við nýggja farinum.

Maskinrúmið er stórt og nossligt við nógvum rúmligum og ljósum arbeiðsrúmum. Uppi á brúnni er nógv at síggja og útsýnið er av tí besta við teimum stóru forstyrktu rútunum allan vegin runt brúnna. Har skiparin situr, hevur hann eina røð av stórummonitorum/telduskermum, sum geva honum allar neyðugar upplýsingar bara við at trýsta á rætta knøttin. Har er eisini ein skermur, við ógvuliga klárum myndum, sum er knýttur til yvirvakingartólini, sum eru sett upp við øll spølini, sum eru undir dekk. Á henda hátt er tað møguligt, eisini á brúnni, at stýra spølunum. Hetta setur eisini trygdarstøðið munandi upp. Hesin sami skermur er eisini knýttur til yvirvakingartól, sum eru sett upp í maskinrúminum.

Nýggi Tróndur í Gøtu er væl størri enn Gamli Tróndur, sum nú er seldur til Peru, har hann skal m.a. fiska rossamakrel. Nýggja skipið er 81,6 metur langt og 16,6 metur breitt, meðni gamla skipið er 67,35 metur langt og 14,5 metur breitt. Nýggi Tróndur í Gøtu lastar 2600 t. og er skrásettur FD175.

### Gomlu sluppinar

Ein kann ikki lata vera at hugsa um munin millum skiparar í dag og tá abbarnir og hjá hesum somu monnum førdu sluppirnar til fiskarí. Stóðu í sydvesti úti á dekkinum og neyðhildu í róðrið, meðni seglini vóru teirra einasta trygd fyri framdrift. Teir høvdu ein "monitor/skerm" at hyggja í og tað var hvussu himmalhválvi og havið háttaði sær. Hesir garpar dugdu nøkur ting, sum yngru skiparnir í dag neyvan høvdu megna eins væl – men væl duga teir yngru menninir kortini, tí við nýmótans amboðum og ovurhonds stórum skipum føra teir til landa ovurhons stórar nøgdir av fiski.

Vit ynskja reiðarí, manning og Gøtu bygd til lukku við nýggja Trónda í Gøtu og Guds signing við skipi og manning.